# Atlantis verður meir fólksligt

**– Tað verða fyrst og fremst fólkslig tiltøk, sum koma at seta dám á Mentanarhúsið Atlantis framyvir, staðfestir nýggi leiðarin Oddur Olsen, sum tó er opin fyri øllum góðum hugskotum, sum kunnu fáa lív aftur í húsið**

MENTAN

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

– Fólk skulu nokk fáa tað, tey vilja hava. Men tað forðar okkum ikki í eisini at bjóða teimum okkurt, sum tey kanska ikki vistu, at tey vildu hava, sigur Oddur Olsen, annar av nýggju leiðararnum í Mentanarhúsinum Atlantis í Klaksvík.

## Skap tørv

Saman við Johhny Olsen hevur Oddur Olsen júst gjørt fimm ára sáttmála við Klaksvíkar Kommunu um at reka Mentanarhúsið, sum annars hevur ligið meir at kalla stilt í longri tíð.

Og hóast tvey stýrið hava givið skarvin yvir í royndini at fáa støðugt virksemið í húsið, eru nýggju leigaranir fúsir at fara til verka.

– Tað er als ongin ivi um, at Klaksvík hevur tørv á teimum tilboðum, sum eitt slíkt hús kann bjóða, og tí eri eg eisni púra vísur í, at tað fer at bera til at skapa lív í húsið, sigur Oddur Olsen, sum longu sær fyri sær eina røð av tiltøkum, sum eru uppløgd at seta á skránna.

– Til dømis hevur Klaksvíkin leingi manglað ein pall til ymsar framførslur. Tað kann vera alt frá konsertum og sjónleikum til fyrilestrar ella frásøgnir av ymsum slagi, sigur Oddur Olsen, sum ikki dylur yvir, at teir í fyrsta umfari fara at geva fólki tað, tey vilja hava.

Tað merkir tó ikki, at teir báðir ikki hava ávísar ambitiónir fyri húsið.

– Vit hava sjálvandi eisini áhuga í at seta okkurt nýtt á skránna og á tann hátt eisini vera við til at skapa ein tørv, heldur enn bara at tekkjast tørvinum, sum longu er, sigur Oddur Olsen.



*– Um fólk ikki koma til eitt tiltak, er tað kanska tiltakinum tað er galið við. Tí ræður um at finna út av, hvat fólk fegin vilja uppliva, sigur Oddur Olsen, annar av nýggju leiðaranum í Mentanarhúsinum Atlantis*

*Mynd: Norðlýsið*

## Opin fyri hugskotum

Hóast hann ásannar, at sokallaða fínmentanin ikki er tað, sum lokkar flest klaksvíkingar úr stovunum, so skal tað eisini vera pláss fyri hesum partinum í húsinum.

Tað ræður um at hugsa nýtt og finna ein máta at skipa tiltøkini, so fólk hava hug at koma, minnir Oddur Olsen á. At tað neyvan verða listaframsýningar sum fara at fylla húsið í bræði, merkir tað ikki, at pláss ikki er fyri myndlist.

– Har kundi man kanska heldur ímyndað sær, at eitt listafólk kom og greiddi frá, hvussu viðkomandi arbeiðir, fær íblástur og so framvegis, sigur hann

Sum frá líður, kann tað tó væl hugsast, at loftið í húsinum verður innrætta soleiðis, at tað kann hýsa listaframsýningum og eini kafé.

Tað ræður stutt sagt um at vera opin fyri øllum hugskotum, og fyrst og fremst síggja møguleikarnar í húsinum heldur enn at stara seg blindan uppa avmarkingarnar. At húsið ikki fær hýst stórum leikverkum, merkir til dømis ikki, at pláss als ikki er fyri sjónleiki.

– Vit hava jú eitt sera dugnaligt sjónleikarafelag her í Klaksvík, so hví ikki fáa onkrar av teirra smærri leikum á pall í húsinum. Tann tørvurin er í øllum til staðar, tí klaksvíkingum dáma jú sera væl at síggja sjónleik, sigur Oddur Olsen

## Kvøldið er langt

Hóast tað ofta hevur verið ført fram, at biografurin í Atlantis er ein forðing fyri øðrum virksemi í húsinum, dugir Oddur Olsen ikki rættiliga at síggja stóra trupulleikan.

– Kvøldið er jú langt, so ein filmur nýtist ikki at blokera fyri øllum øðrum. Tað ber jú at at flyta eina filmssýning ein tíma aftur ella fram, um tað er tað, sum skal til.

Biografurin kemur í øllum førum at halda fram í húsinum - ikki minst tí hann leingið hevur givið eitt ávíst fíggjarligt avkast. Tað er millum annað yvirskotið frá biografinum sum ger, at tað ber til at seta onnur tilboð á skránna í húsinum, so tað snýr seg um at fáa alt at sampakka á onkran hátt, staðfestir Oddur Olsen.

Hann ásannar tó, at stóra avbjóðingin í fyrsta umfari verður at fáa klaksvíkingar vekk frá sjónvarpinum og út úr stovunum.

– Hatta við at klaksvíkingar ikki koma til mentanartiltøk kann hava nógvar orsøkir. Um fólk ikki koma til eitt tiltak, er tað kanska tiltakinum tað er galið við. Ella hevur fyriskiparin ikki dugað nóg væl at lýsa við tí.

Longu 1. mars letur Mentanarhúsið Atlantis upp við nýggju leiðararnum. Millum fyrstu tiltøkini á skránni verður ein øðrvísið konsertogspurnarkappingin Á Quistinum hjá Gunnari Nolsø.




**PEUGEOT 407 COUPÉ 3.0** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** BJ 455 **Km:** 42.000
**Árgangur:** juni 2006
**Útgjald:** 62.000 **Mðr. gjald:** 3.874 (5 ár)
**kr. 248.000,-**



**NISSAN PATROL 3.0** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JT 530 **Km:** 98.000
**Árgangur:** juli 2001
**Útgjald:** 60.000 **Mðr. gjald:** 3.516 (1,5 ár)
**kr. 115.000,-**



**PEUGEOT 307 1.6 STC,** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** FP 505 **Km:** 44.000
**Árgangur:** okt. 2006
**Útgjald:** 36.250 **Mðr. gjald:** 2.289 (5 ár)
**kr. 145.000,-**



**TOYOTA HIACE 2.5 STUTTUR** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** TB 516 **Km:** 30.000
**Árgangur:** des. 2006
**Útgjald:** 44.500 **Mðr. gjald:** 2.805 (5 ár)
**kr. 178.000,-**



**BMW 118 2.0** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SH 570 **Km:** 5.000
**Árgangur:** jan. 2009
**Útgjald:** 59.500 **Mðr. gjald:** 3.730 (5 ár)
**kr. 238.000,-**



**VW CADDY 2.0 SDI DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** UJ 435 **Km:** 45.000
**Árgangur:** apríl 2007
**Útgjald:** 32.000 **Mðr. gjald:** 2.033 (5 ár)
**kr. 128.000,-**



**TOYOTA YARIS 1.3 LUNA M/M** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** GB 420 **Km:** 36.000
**Árgangur:** august 2006
**Útgjald:** 34.000 **Mðr. gjald:** 2.125 (5 ár)
**kr. 136.000,-**



**TOYOTA HILUX 2.5 EX. CAB SR** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JD 261 **Km:** 30.000
**Árgangur:** mai 2008
**Útgjald:** 62.000 **Mðr. gjald:** 3.884 (5 ár)
**kr. 248 .000,-**



**PEUGEOT 206 2.0 DIESEL VØRUV.**

**Skrásetingarnr:** JU 505 **Km:** 53.000
**Árgangur:** jan. 2004
**Útgjald:** 22.000 **Mðr. gjald:** 2.179 (3 ár)
**kr. 74.000,-**



**TOYOTA HILUX 4X2 2.5 TD** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SP 526 **Km:** 23.000
**Árgangur:** aug. 2007
**Útgjald:** 43.750 **Mðr. gjald:** 2.760 (5 ár)
**kr. 175.000,-**

6 mánaða garanti

**Vit bjóða 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipan, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eyðsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
**Kom og vitja okkum – landsins fremstu bilasølu.**

Brúktir bilar við **lagaligari fígging**

**REYNI SERVICE** P/F
Vegurin Langi · Hoyvík · Tel 353040 · Fax 353041
Við Borðoyavík · Klaksvík · Tel 473040 · Fax 473041
T-postur: rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo